# Jólaborð á Hotel Føroyum

**Hotel Føroyar helt eitt sokallað »royndar jólaborð« hósdagin. Nú skal jólaborðið betrast, og tískil hava tey stoypt eitt heilt show, sum verður karmur um góða lagið hjá fyritøkunum og privatpersónum sum tekna seg til jólaborðið**

JÓLABORÐ
*Rókur Jákupsson Jakobsen*
*rokur@sosialurin.fo*



*Talan er um heilstoypt konsept, har lítið og einki verður latið til tilvildina*

**Nú er tíð at gleða seg…**

At trína inn í veitsluhøllina á Hotel Føroyum í mikukvøldið var sum at kava í tað mest jólaliga umhvørvið nakrantíð. Jólaprýði hekk rundan um alt rúmið, og tú var enn einaferð mintir á, at hóast vit enn eru mitt í november, ja, so nærkast jólini við miklari ferð. Tí jólini eru ikki longur miðsavnað rundan um 24. desember. Nei, jólini eru spjadd út um allan november og desember, sum ein endaleys áminning um, at tað er nú at tú skalt hugna tær. Og tí halda vit jólaborð við øllum teimum, ið vit halda saman við. Teimum nærmastu, arbeiðsplássinum, kórinum o. s. fr. Jólaborð hoyra snøgt sagt, jólunum til.

Hotel Føroyar høvdu eina aðalroynd av teirra jólaborði mikukvøldið. Hetta var gjørt fyri at samantvinna allar luttakandi partarnir. Tænarar, kokkar, skemtarar og tónleikarar eru við at gera karmarnir so góðar sum til ber, og hetta flýtur ikki av sær sjálvum; tað má sjálvsagt roynast. Og tí vóru eini 50 boðin til eitt royndar jólaborð.

Her settist eg so í hesum jólaprýdda rúmi og hugnaði mær aftur við Finnur Hansen Band, sum spældu eina kavalkadu av øllum jólaslagarum. Fólk sita við borðini, og tað merkist at tað er mikukvøld, tí at øll eru so spøk og friðarlig. Men so, alt fyri eitt, byrjar showið.

Robert, Rasmus og Magnus lupu út á pallin í sonnum show stíli og byrjaðu kvøldið við einum skemtingarsomum sangi, sum greiddi okkum frá, hvat ið var okkum í væntu. Teir tríggir sungu og skemtaðu í eina løtu, og so var forrættur settur inn til okkara.

Hóast eg ikki dugi serliga væl at lýsa, hvussu alt smakkaði, so kann eg garantera tykkum, at hetta smakkaði avbera væl. Ein góð blanding av fiski, skinku, og onkrum grønum var at fáa til forrætt. Tá ið vit spakuliga eru liðug við forrættin, renna teir tríggir upp á pallin aftur. Teir undirhalda óført, og fólk eru fleiri ferðir um at brotna, so stuttligir eru teir.

Høvuðsrætturin var eisini framúr. Her er talan um eina frálíka oksafilet við heilbakaðum eplum og salati, og eisini hetta rakti plett. Hetta smakkaði so væl, at eg siti og gerist svangur aftur nú bara við at minnast aftur á høvuðsrættin.

Til síðst kom »rís a la mande« á borðið, og sangurin gekk óført.

**Tí jólini nærkast í hvørjum...**

Tað sum eg haldi riggaði allarbest við kvøldinum var, at tú kendi, at her var onki tilvildarligt á skránni. Hetta jólaborðið er eitt heilstoypt konsept, og tað verður fylgt allan vegin út. Tað er eitt veruligt show, sum Linie 3, sum koyrir, meðan tú hugnar tær við tínum vinfólki.

Konseptið riggaði ólukksáliga væl. Matur, undirhald, sangur og service var í topp, og so kunnu vit ikki krevja meir av einum jólaborðið, ha?

# Bjargingarbát til Havnar Bjargingarfelag

**Gongst sum ætlað, hevur Havnar Bjargingarfelag keypt ein spildurnýggjan bjargingarbát á sumri 2007. Á fundi í sunnudagin vórðu limirnir kunnaðir um forvitnisligu verkætlanina**

BJARGINGARBÁTUR



*Havnar Bjargingarfelag fyrireikar í løtuni keyp av einum bjargingarbáti av slagnum Victoria*

Havnar Bjargingarfelag hevur leingi havt ætlan um at keypa ein skjóttgangandi bjargingarbát. Nú er ætlanin komin so mikið ávegis, at klárt var sunnudagin at kunna limirnar um ætlaða keypið.

Talan verður um eins svenskan bát í sokallaða Victoria flokkinum, ið kostar umleið 4 milliónir kr. Báturin hevur 1000 hestar, er bygdur til endamálið og hevur alla neyðuga serútgerð. Eitt nú vendir hann eisini runt aftur av sær sjálvum, um hann hvølvist. Ein svenskur bátur av slagnum kemur á royndarsigling í Føroyum í apríl mánað fyri at kanna, hvussu hann hóskar til umstøðurnar í Føroyum.

Lítil ivi er um, at brúk er fyri einum slíkum báti í Suðurstreymoyarøkinum, sum er bygdur serliga til bjarging á sjónum. Felagið hevur tvær ferðir í ár verið úti til slíkar uppgávur, har neyðugt var at lána ein bát.

Jens Jensen, formaður í Havnar Bjargingarfelag, sigur, at í teirra uppleggi til mynduleikarnar verður mett, at brúk er fyri fýra bjargingarbátum í Føroyum, ein til hvørt bjargingarøki. Tá kann samlaða sjálvbodna bjarginartænastan dekka eitt arbeiðsøki uppá 10 til 15 fjórðingar úr Føroyum.

**ave**

## Áhugi er fyri Atlantic Airways

**Greiðar ábendingar eru um, at áhugaðir keyparar eru til Atlantic Airways. Tað sigur Peter Holm, stjóri í Kaupthing, sum fegnast um, at einskiljingar av almennum fyritøkum nú byrja av álvara**

Í Sosialinum mikudagin setti Peter Holm spurnartekin við, at landstýrið fyrst einskildi Atlantic Airways og Livstrygging. Hann helt, at landstýrið hevði fingið eitt størri succesupplivilsi, um Føroya Banki og Føroya Tele vóru privatiserað fyrst.

Bjarni Djurholm segði í einum aftursvari hósdagin, at hann var ósamdur við Peter Holm. Hann helt, at tað var nógv meira torskilt at einskilja Føroya Tele enn Atlanic Airways. Hann nýtti eisini høvið til at vissa Føroya fólk um, at ætlanin er ikki at bróta nakað niður. Vit hava eitt endamál, og tað er at byggja upp, segði hann.

Til hetta sigur Peter Holm, at tað er at frøast um, at vit nú endiliga standa framman fyri eini byrjandi einskiljing.

-Gamaníkundieghugsað mær, at onkur viðurskifti í einskiljingartilgongdini sum heild og í einskiljingarætlanunum fyri einstøk feløg vóru øðrvísi. Men tað týdningarmesta er tó, at tað endiliga sær út til, at einskiljingarnar fara at byrja.

Víðari sigur hann, at tað er gott, at tað endiliga sær út til, at gongd kemur á einskiljingartilgongdina, og at tað fer at fáa ómetaliga stóran týdning fyri dynamikkin í okkara búskapi og kapitalmarknaði.

Tá vit spyrja hann, um hann hevur keyparar til Atlantic Airways, er hann eitt sindur afturhaldandi, men kemur tó við einari greiðari ábending.

- Atlantic Airways er eitt felag, sum eigur at vera yvirkomiligt at selja. Kaupthing fer í øllum førum at vísa einskiljingini av Atlantic Airways áhuga. Okkara fyrireikingar til hetta vísa longu nú, at partar eru áhugaðir at ogna sær Atlantic Airways. Greiðar ábendingar eru um hetta, sigur Peter Holm stjóri á Kaupthing.

Síðani Kaupthing kom á føroyska marknaðin, hevur Kaupthing fyriskipað keyp og sølu fyri bæði føroyingar og útlendingar.

Peter Holm vil ikki svara, um áhugaðu keyparnir eru føroyingar ella útlendingar, men hann vísir á, at tá tað snýr seg um einskiljingar, so ræður um at finna rætta keyparan, sum vil geva rætta prísin fyri fyritøkuna, og tá er tað ikki avgerandi, um keyparin er føroyingur ella útlendingur.



*Stjórin í Kaupthing sigur, at longu nú hevur felagið merkt ítøkiligan áhuga fyri partabrøvum í Atlantic Airways*

## Jólasøla í Klaksvík

**Árliga jólasølan hjá varda Verkstaðnum á Brekku í Klaksvík, verður nú leygardagin**

JÓLASØLA
*tíðindaskriv*

Eins og undanfarnu árini, verkstaðurin tað, sum framleitt gjøgnum árið. Ein stórur partur er jólaprýði, ella eitthvørt ið kann nýtast til jólagávur.

Í framleiðsluni er dentur lagdur á at framleiða vøru sum á ein ella annan hátt er forkunnug ella sermerkt.Eitt nú eru jóladekoratiónirnar gjørdar úr rekaviði, tara og sjógrasi. Eisini hava eru dekoratiónir, sum eru gjørdar úr hornum.

Hartil er í ár eitt nýtt slag av jólanissum, sum eru ætlaðar at standa uttan fyri við eini lykt við livandi ljósi í. Nissurnar fáast bæði sum pør og stakar, eru umleið 80 cm. høgar, trivaligar og tola tað føroyska vetrarveðrið.

Av øðrum, sum fæst til keyps, kunnu nevnast pakkakalendarar, dúkar undir jólatræið, jólapappírsklipp, jóladúkar. Og so eru tey væl umtóktu skeribrettini til skerpikjøt sjálvandi eisini at fáa.

Opið er frá 10-16, tá jólasølan er á skránni komandi leygardag.